## Hálvt ára fongsul fyri álop við knívi

HARÐSKAPUR
*Stefan í Skorini*

Tann 42 ára gamli maðurin, sum var ákærdur fyri at hava stungið ein 24 ára gamlan mann við knívi tvær ferði, fekk seks mánaða fongsulsrevsing. Hann tók ímóti dóminum og er longu farin undir at sita dómin.

Maðurin hevði stungið hin mannin tvær ferðir við felliknívi, og annað lunga var punkterað. Maðurin greiddi frá, at hann bara hevði vart seg sjálvan, men hetta álopið var ov grovt sambært dómaranum til at talan kundi vera um sjálvverju.

Maðurin var eisini ákærdur í fleiri øðrum førum fyri innbrot og stuldur. Hesum varð hann eisini funnin sekur í. Hann hevur brotið inn á Landssjúkrahúsið og stolið vandamiklan heilivág, og hann hevur eisini stolið heilivág frá skipi. Harumframt hevur maðurin fleiri aðrar dómar hangandi yvir sær, tí talan er um ein gamlan kenning hjá løgregluni.

Maðurin er framvegis ákærdur fyri at hava hótt ein mann eftir lívinum, men henda ákæra verður viðgjørd seinni.

## Summarhús illa viðfarin

HERVERK
*Stefan í Skorini*

Eini summarhús, ið standa á Hálsavøtnum við landsvegin millum Skopun og Sand, hava verið fyri umfatandi herverki í vetur.

Tá eigararnir av húsunum komu aftur til húsini, varnaðust tey, at gerningsmenninir høvdu brotið fleiri rútar, og nógv annað var eisini oyðilagt. Ein stór ljósakrúna og nakrar petroleumslampur eru stolnar úr húsunum.

Løgreglan á Sandi kann bert staðfesta, at herverkið er farið fram einaferð í vetur. Tó er ein slóð at elta. Onkur hevur sæð fólk inni í húsunun, og kanska kann hetta kasta ljós á tilburðin.

Eini summarhús í Skopun hava eisini finið somu viðferð í vetur, men løgreglan hevur enn ikki funnið gerningsmannin.

## Tríggir missa kortið

LØGREGLUTÍÐINDI
*Stefan í Skorini*

Løgreglan hevur um vikuskiftið verið úti við ferðmátaranum, og tríggir bilførarar fáa eina treytaða frádøming av koyrikortinum.

Løgreglan var í Kaldbaksbotni leygarmorgunin og fangaði tveir bilførarar, sum koyrdu 116 og 117 kilometrar um tíman. Hetta hevur við sær eina treytaða frádøming av koyrikortinum og ein tvey ára treytaðan dóm. Sunnumorgunin var ferðsluløgreglan aftur í Kaldbaksbotni og tók enn ein bilførara. Tilsamans seks frágreiðingar vóru skrivaðar. Ein bilførari var eisini tikin fyri rúsdrekkakoyring.

Fríggjamorgunin var løgreglan í Kommunuskúlanum og tók fimm ólógligar skutarar og knallertir. Trupulleikin hjá løgregluni er, at skutarar mangan koyra undan løgregluni eftir smalum vegum, har bilarnir ikki kunnu koyra og tí er neyðugt at fremja onnur tiltøk móti knallertum og skutarum.

Sunnudagin boðaði ein bileigari frá, at onkur hevði roynt at stolið bilin við at klippa leidningarnar til startaran av, men hetta miseydnaðist.

## Einki at gera á Eystanstevnu

STEVNA
*Stefan í Skorini*

Eystanstevnan spældi ógvuliga friðarliga av. Møguliga var tað tað ringa veðrið, ið gjørdi sítt til, at løgreglan hevði minni at gera enn vant á stevnum.

Løgreglan tók leygarnáttina tveir bilførarar, ið koyrdu ávirkaðir, og hesir missa helst koyrikortið. Tilsamans tríggir mans vóru so ávirkaðir, at teir máttu sova rúsin av í klivanum í Runavík.

Semja í Útnorðurráðnum:

# Samferðslan skal betrast



*– Málið er at fáa bíligari og betri ferðasamband millum tey trý londini í Útnorði. Hetta kann bert lata seg gera, um politikararnir eru fúsir at taka stór tøk saman við vinnulívinum, so at vit kunnu røkka okkara endamáli, sigur Hjálmar Árnason, formaður í Útnorðurráðnum*
*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Trupulleikin í Útnorði er, at samferðslan londini millum ikki er nøktandi sambært teimum politikarum, ið vóru við á ráðstevnuni um samferðslu í Útnorði. Størsti trupulleikin er, at prísirnir eru ov høgir og fráferðirnar ov fáar**

SAMFERÐSLA
*Stefan í Skorini*

Íslendingurin Hjálmar Árnason, formaður í Útnorðurráðnum, er sannførdur um, at samferðslan millum tey trý londini í Útnorði, sum eru Føroyar, Grønland og Ísland, kann betrast munandi.

– Málið er at fáa bíligari og betri ferðasamband millum tey trý londini í Útnorði. Hetta kann bert lata seg gera, um politikararnir eru fúsir at taka stór tøk saman við vinnulívinum, so at vit kunnu røkka okkara endamáli, sigur Hjálmar Árnason.

Hann leggur dent á, at tann vanligi marknaðurin ikki loysir teir trupulleikar, sum eru á samferðsluøkinum í Útnorði.

– Saman kunnu vit finna loynir og fremja betringar innan samferðslu í Útnorði, so at vinnulívið eisini kann mennast av hesum, sigur formaðurin.

Hann vísti samstundis á, hvussu torført tað var at hava eitt framkomið samferðslukervi í Útnorði vegna tey landafrøðiligu viðurskiftini. Her búgva 400.000 fólk á einum øki, ið er á stødd við Evropa.

### Høgir prísir

Ein tann størsti trupulleikin innan samferðlu í hesum økinum er, at prísirnir eru alt ov høgir. Vanlig fólk hava heilt einfalt ikki ráð at ferðast nógv í Útnorði vegna teir høgu prísirnar. Ein av uppgávunum verður tí at fremja tiltøk, ið kunnu lækka prísirnar á ferðaseðlum.

Tað kemur sjálvandi ikki uppá tað at fara undir eina rutu, ið gevur hall. Flogfeløgini mæltu tí til, at avgjøld á flogvallum og ferðaskattur verða avtikin, so at ávísar rutur verða bíligari at reka, og á tann kann prísurin á ferðaseðlum setast niður. Hetta hevði økt um eftirspurningin og samferðsluna í Útnorði.

Magni Arge frá Atlantic Airways og Jón Karl Ólafsson vóru samdir um, at fleiri møguleikar eru eftir at troyta innan samferðlu, og teir vóru fúsir at kanna hesar møguleikar nærri.

Flogfeløgini vístu á, at eingi fløgfeløg í heiminum hava so lítið fólkagrundarlag at byggja sítt virksemi á. Tí er tað sera torført hjá teimum at fáa tær ymsu ruturnar at bera seg.

### Eingir ráðharrar

Føroyski landsstýrismaðurin við samferðslumálum, Bjarni Djurholm, var til staðar, men tíverri vóru teir avvarðandi ráðharrarnir úr Íslandi og Grønlandi ikki við. Tað hevði givið ráðstevnuni størri tyngd, men hol er nú sett á kjakið um trupulleikarnar við samferðslu í Útnorði.

Formaðurin Hjálmar Árnason hevði seinasta orðið á ráðstevnuni, og hann vildi vera við, at Útnorður skal gera seg meira sjónligt í norðurlendskum høpi. Eitt nú kundu limir úr Norðurlandaráðnum verið bodnir við, so at teir verða kunnaðir um tey hjartamál, sum Útnorðurráðið arbeiðir við.



# Gáa eftir ferðini í Vágum



*Tað er heilt týðuligt at síggja, hvussu ferðin minkar, frá tí talvan tendrar, til bilurin er farin framvið. Ikki var óvanligt ta løtuna, Sosialurin hugdi at ferðgáanum í Sandavági, at ferðin minkaði við umleið 20 kilometrum um tíman, tá bilførarin sá, hvussu skjót hann koyrdi*
*Mynd: Edvard Joensen*

**Fýra ferðmátarar, sonevndir ferðgáar, eru settir upp í Vágum. Talan er um ljóstalvur, sum vísa, hvussu skjótt tú koyrir, tá tú fert fram við hesum talvunum**

FERÐKANNING
*Edvard Joensen*

**Sandavági:** Fýra ljóstalvur standa við vegin í Sandavági og Miðvági. Tær siga bilførarum, sum fara framvið, hvussu skjótt teir koyra. Avleiðingin hevur longu verið, at ferðin er minkað.

Finnleif Durhuus, leiðari á Vegadeildini hjá Landsverkfrøðinginum, sigur, at hesir ferðmátararnir, sum settir eru upp, eru liður í ferðkanningum, Landsverkfrøðingurin hevur gjørt í vetur.

– Tað hevur víst seg, at ferðin ymsastaðni hevur verið í meira lagi, og roynt verður nú við hesum tølunum at fáa hana lækkaða.

Aðrastaðni, har slíkar talvur eru settar upp, hevur tað víst seg, at meðalferðin er lækkað við fimm til sjey kilometrum um tíman, sigur Finnleif Durhuus. Og júst at fáa fólk at lækka ferðina, er endamálið við hesum tiltakinum, vísir leiðarin á Vegadeildini hjá Landsverkfrøðinginum á.

Ferðgáarnir standa á vognum, sum fluttir verða kring landið, har mett verður, at tørvur er á teimum. Teir hava millum annað verið royndir uttan fyri Kollafjarðartunnilin við góðum úrsliti, sigur Finnleif Durhuus.

### Hevur ávirkan

Sandavágur er onnur bygdin í Vágum, har hesir ferðgáarnir standa. Rósa Samuelsen, borgarstjóri í Sandavági, sigur, at hóast teir bara hava staðið uppi eitt vikuskifti, eru greiðar ábendingar á, at teir hava ætlaðu ávirkanina. Nevniliga, at bilarnir seta ferðina niður.

– Tað er heilt greitt, at bilarnir høgga bremsurnar í, tá teir knappliga síggja á eini talvu, at teir koyra ov skjótt. Loyvt er at koyra 50 kmt. har gáarnir standa, og tann, sum higartil er máldur at koyra skjótast, var oman fyri 80 kmt., og tá er koyrikortið í álvarsligum vanda, sigur hon.

Rósa Samuelsen sigur annars, at Sandavágs Kommuna hevvur einki við hesar gáarnar at gera. Tað er Landsverkfrøðingurin burturav, sum tekur sær av hesum.

Sandavágs Komuna hevur hinvegin biðið um at fáa ferðforingar í vegin, men hevur ikki fingið tær.

– Fæst hetta at rigga, er tað í lagi sigur Rósa Samuelsen, sum vónar, at gáarnir fara at verða standandi í hvussu er eina tíð.

### Ferðgáar

At nevna hesar vognarnar við ljóstalvunum ferðgáar er úrslit av eini uppskotskapping, sum Landsverkfrøðingurin hevur stílað fyri. Tann sum kom við vinnandi hugskotinum, var Hans Kristian Mikkelsen, verður sagt í tíðindaskrivi, sum sent er frá frá Landsverkfrøðinginum.

Navnið er funnið í samstarvi við málfrøðingin Jóan Hendrik Winther Poulsen, og vísir tað til, at her er tól, sum gáar eftir ferðini hjá bilunum, sum koma strúkandi framvið, verður sagt í tíðindaskrivinum.

Anna E. Klett:

# Vunnið heiðursløn fyri nútíðar tónleik

**Anna E. Klett, klarinettspælari, hevur fingið eina heiðursløn frá Dansk Komponistforening fyri sítt spæl við klarinettini og nýggjum tónleikaverkum**

TÓNLEIKUR
*Heri á Rógvi*



*Anna E. Klett hevur fingið eina heiðursløn frá Danska Komponistforening.*
*Mynd: Jens Kristian Vang*

Í hesum døgum regnar tað við heiðurslønum til føroyskar tónleikarar. Fyri stuttum gjørdist tað alment kent, at Sunnleif Rasmussen hevði fingið virðisløn fyri Norðurlandaráðnum fyri hina fyrstu symfoniina, Oceanic Days.

Um mánaðarskiftið varð Anna Elisabeth Klett heiðrað við heiðursløn frá Dansk Komponistforening.

Anna sigur sjálv, at virðislønin verður latin etableraðum tónleikarum fyri arbeiðinum hjá teimum.

Anna hevur fingið sína heiðursløn fyri nýggjan tónleik av klassiskum slag, sum hon at kalla spælir burturav. Hon spælir til dagligt í Danmark, og hon hevur fingið skrivað fleiri verk til sín og hevur samstarv við nógv kend tónaskøld í Danmark.

– Eg haldi tað vera stórt, at fólk viðurkenna mítt arbeiði, sigur Anna Elisabeth Klett.

Við heiðurinum fylgdu eisini 20.000 kr.

Sum tað eisini verður umrøtt aðrastaðni í blaðnum, so er Anna Klett í Føroyum í hesum døgum og spælir saman við Aldubáruni.

### Athelas

Anna Elisabeth Klett hevur tikið prógv við konservatoriumið í Keypmanna í 1991, og hon tók prógv sum solospælari í 1994. Hon hevur eisini studerað tónleik á lærdum háskúla í Geneve í Sveis. Hon arbeiðir í løtuni sum freelance tónleikari í Keypmanna, og hon er eisini knýtt at stats emsemblinum Athelas í Keypmanna, t.e. ein sinfionetta. Athelas kemur eisini til Føroya at spæla í sambandi við summartónar.

Hon hevur eisini givið eina fløgu við manni sínum og tónaskaldinum Jens Hørsving, sum nýtir teldu til at gera tónleik. Fløgan hjá teimum kallast Roto.

Sosialurin ynskir Onnu hjartaliga tillukku.